

**Vegleiðing í samband við andlát og jarðarferðir úr Bønhúsinum á Hellunum**

Bønhúsið á Hellunum er partur av Fuglafjarðar kirkjusókn.
Tá jarðarferð verður úr Bønhúsinum eru fleiri viðurskiftir í skulu avtalast. Í hesum sambandi kunnu avvarðandi venda sær til annan av Bønhústænarunum:

**Símun Hans Jacobsen, tlf. 444292 ella 264228**
**Jórun Eið Johannesen, tlf. 584473**

**Organistur:**

Avvarðandi biðja organist.

**Sangarar:**

Avvarðandi biðja einar 8 sangarar til jarðarferðina.
Sangararnir standa inni í kór og syngja fyri saman við urguni.
Sangararnir og prestur ganga framman fyri líkbilin og syngja sálmar frá Bønhúsinum og fram á kirkjugarðsvegin. Oman eftir kirkjugarðsvegnum syngja teir “Føgur er foldin”.

**Sálmaval:**

Avvarðandi velja sálmarnar í samráð við prest.
Sungið verður úr sangblaði ella úr sálmabókini.

**Tá kistan kemur í Bønhúsið:**

Bønhústænari tekur ímóti, so her er umráðandi at siga frá áðrenn.
Tá kista kemur í Bønhúsið, er vanligt at hava eina bønarløtu við Faðir vár og tveimum sálmum bæði í Bønhúsinum og har kistan kemur frá, heiminum, sjúkrahúsinum ella aðrastaðni.
Bønhústænarin kann átaka sær hesa uppgávu, um avvarandi biðja um tað.

**Ervið:**

Ervið kann vera í Bønhúsinum, um avvarandi skipa fyri tí.
Annars er vanligt at hava ervið í privatum heimum á Hellunum.